

FERÐASEÐILIN

	Tíðarskeið	Kostnaður Úr kr.
NORRÖNA CRUISE:		
Tórshavn-Lerwick-Tórshavn	24.06—26.06	**1.424,-** (v. gisting)
Tórshavn-Bergen-Tórshavn	24.06—26.06	**1.040,-**
Tórsh.-Seyðisfjørð-Tórsh.	19.06—21.06	**860,-**
BUSSFERÐIR:		
Til Noregs	24.06—03.07	**4.395,-**
PAKKAFERÐIR:		
Danmark:		
Vigsø Feriecenter. Summarhús í 7 dagar (6 fólk)	21.06—01.07	**2.665,-** fyri hvønn
Agger Tange. Íbúð í 7 dagar (5 fólk)	21.06—01.07	**2.470,-** fyri hvønn
Noreg:		
Hardanger Feriesenter. Summarhús í 7 dagar (6 fólk)	24.06—03.07	**2.385,-** fyri hvønn
Hetland:		
Summarhús í 8 dagar (6 fólk)	24.06—03.07	**1.761,-** fyri hvønn
Á hotelli í 8 dagar	24.06—03.07	**3.625,-** fyri hvønn

»SERTILBOÐ«

Bilpakki!!! (Upp til 4 fólk í einum bili)

Tórshavn-Hanstholm-Tórsh.	21.06—29.06	**5.490,-** ialt
Tórshavn-Bergen-Tórshavn	lágarstíð	**3.990,-**
	háarstíð	**4.990,-**

NÝTT — NÝTT — NÝTT FLÚGV & SIGL

Føroyar-Danmark-Føroyar úr kr. **2.200,-**

SMYRIL LINE
THE NORTH ATLANTIC LINK
J. Broncksgøta 37 · Box 370 · Tlf. 15900 · FR 110 Tórshavn



RYGGURIN!

Kennir tú aftur onkrar av hesum trupulleikum

— gev so tær sjálvum ½ tíma um dagin



Vanligur prisur 2406,- kr.
Tilboðsprisur **1990,- kr.**

- Ilt í rygginum
- Ilt í lendunum
- Ischias
- Beinkrampa
- Diskusprolaps

— so veitst tú eisini hvussu ringt hetta kann vera, men SUPRAMED HITA- & MASSASJUPUTAN við infrarøðu hitanum hevur hjálpt mongum til eitt betri og peiulevsari lív.

SUPRAMED HITA- & MASSASJUPUTAN við infrarøðu hitanum er snøgt sagt bestu hjálpin móti knappligum óvæntaðum brekum sum móti verandi og aftanverandi pínu.

Fremstu fysioterapeutar og viðgerðarar við mesta nýtslu av SUPRAMED HITA- & MASSASJUPUTINI, tí hetta nýggja púra virkar við bæði massasju og infrarøða hitanum samstundis — og hetta finnur so tað munar.

Ger sjálvur okkurt munagott við pínuna NÚ!

SUPRAMED HITA- & MASSASJUPUTAN

— *vælroynd tysk dygdarframleiðsla*

10 ára framleiðslu trygd
Orkusparandi
30 daga royndartíð

Ringið ella sendið okkum lepan og fáið sendandi upplýsingartilfar um SUPRAMED HITA- & MASSASJUPUTINA.

S.C. SKIPAN, Box 1297
110 Tórshavn · Tlf. 18659

TILHALDSHÚSIÐ
SKANSIN



Bleyt song, við morgunmati:

1 fólk **285,-** 2 fólk **385,-**

Síðani matgera tit sjálvi ella eta úti — sum hugurin er.

Sjónvarp og køliskáp í hvørjum kamari!

TELEFON 12242
TELEFAX 10657

JEKARAGØTA 8
FR-110 TÓRSHAVN



Burtur við pappinum - fram við fløskunum

Umhvørvi og íløt:

Einnýtsla má lúta fyri endurnýtslu

I týska stórbýnum er frá 1. mai í ár sett bann fyri so at siga øllum einnýtsluíløtum. Øl, sodavatn og fruktsaft er heilt bannað í einnýtsluílátum, og vín og mjólk hava fingið eina ávísa freist at leggja um til endurnýtsluíløt. Mest umhvørvisvinarliga ílatið til allar drekkivørur sigst enn at vera glasfløskan, ið verður vaskað og endurnýtt ferð eftir ferð.

Týski umhvørvisráðharrin er eisini farin undir at gera nýggjar lógir um pakkitilfar yvirhøvur. Stigvíst fram til 1995 skal alt pakkitilfar nýtast aftur. Sagt verður, at Týskland er við at kvalast í royki av ruskovnum og ruskrúgvum. Ábyrgdina fyri at leggja um til endurnýtslupakkitilfar hevur framleiðarin.

Í Hamburg umhugsar býarstýrið at noyða McDonalds og Burger King at nýta endurnýtslutilfar á matstovum sínum.

Hetta kemur skjálvandi ikki væl við hjá teimum, sum framleiða einnýtsluíløt og tilfar. Hesar fyritøkur vilja vera við, at íløt teirra eru umhvørvisvinarlig. Hesum boða feløgini frá í lýsingum, m.a. í New York Times, men nú hevur stjórin í brúkarastovninum í New York stevnt fyritøkunum fyri at hava sett fram rangar upplýsingar í lýsingum, og hesum fáa tær bót fyri.

Sagt verður, at í mongum av einnýtsluílátunum eru trý evni: plast, aluminium og papp og tað er næstan ikki gjørligt at skilja hesi trý evnini frá hvørjum øðrum. Tí er tilfarið ikki umhvørvisvinarligt, hvørki tá tað liggur á gøtuni ella tá tað verður brent.

Framhald av síðu 5

Lekur ov nógv

- Hetta er einki nýtt, sigur Ida Sørensen, tí sjálvandi vil tað altíð vera ein munur. Tíverri er tað helst so, at munurin er nógv størri enn ynskiligt er. Men vit vóna, at nýggja útbúgvingin fer at gera sítt til, at komandi sjúkrasystrarnar koma út við einum hugburði, sum ger tær førar fyri at menna sjúkrarøktina.

Ida Sørensen sigur, at sparingarnar á sjúkrahúsverkinum eru framdar soleiðis, at vit hava ráð til viðgerð, men ikki til sjúkrarøkt.

- Tað kann ikki vera rætt. Eins og røkt munar lítið uttan viðgerð, so munar viðgerð uttan røkt heldur ikki, sigur fyrisøðukvinnan, og vísir á, at í mongum førum vera røktarsjúklingar - t.d. frá ferðsluskaðum - útskrivaðir til avvarandi, ið hava fáar og smáar møguleikar at vera um tey.

Ikki nóg mikið at vera fitt

Í Danmark hevur hugtakið *discount-sjúkrarøkt* vunnið hevd; t.v.s. at so nógvir sjúklingar verða viðgjørdir upp á so stutta tíð sum gjørligt og útskrivaðir so skjótt sum gjørligt.

- Tað má ikki henda, at vit koma so langt her. Tí er tað umráðandi, at vit fáa sjúkrasystrar, ið duga síni ting, men sum eisini duga at siga 'nei', tá viðurskiftini ikki eru forsvarlig.

- Enn í dag eru vit í alt ov stóarn mun tær fittu og viðeirðiligu genturnar, og tað verður okkum til ógagns, tá saman um kemur, sigur Ida Sørensen.

Tað er rætt at útbúgva sjúkrasystrar í Føroyum, heldur Ida Sørensen, tí tørvur er eisini á teimum í løtuni, serliga til sálarsjúklingar og eldri fólk, sigur Ida Sørensen. Munurin er bert tann, at í mun til árini herfyri, ber ikki til at velja og vraka millum størv.

ówh

OKKARA DYGD - TÍN TRYGD!


Vit geva okkum stundir, tá ið vit gera myndir tínar. Vit hava serkøn starvsfólk, við hollum royndum innan framkalling, ið nýta mest framkomnu **KODAK** teknifrøðina og **KODAK** tilfar. Hetta er tín trygd fyri góðum myndum, um tú letur okkum filmin at framkalla.

Vælkomin í:

SMS FOTO

TLF. 19820

HÚSAGLUGGIN



Gluggin til ta føroysku familjuna. Sera smidligur og lættur at handfara. Ramma, karmur og beslag 100 mm breitt. Stødd eftir ynski.

Tilboð givið óbindandi. Biligari og betri.

FØROYA GLUGGI
370 Miðvágur · Tlf. 32411 · Telefax 33073

- vindeygu
- ulhurðar
- altanhurðar
- skjótihurðar
- sjónlutovur
- Windsor porti